# Frí í Føroyum 2007 av bakkastokki

Aftur í ár skipar SamVit (fyrrverandi Ferðaráð Føroya) saman við kunningarstovunum kring landið fyri herferðini Frí í Føroyum, hvørs endamál er at eggja føroyingum at ferðast í Føroyum. Skjøtil veður settur á herferðina við áhugaverdum tiltøkum í SMS og undir Bryggjubakka komandi vikuskifti.

Elin Heinesen, stjóri á SamVit, setti Frí í Føroyum á torginum í SMS kl. 15.00 í gjár, og tá var eisini undirhald á skránni. Veitarar innan føroysku ferðavinnuna byrjaðu longu frá kl. 10 á morgni at sýna fram sínar vørur og tilboð á torginum, og her fara ymiskir veitarar at vera líka til leygardagin 12. mai. Har fara at vera alt frá kulum festivalum til forvitnisligar bátaferðir og klædnasniðgevar.

SamVit og kunningarstovurnar veita kunning og góð ferðaráð, og aftur í ár verður høvi at hoyra søgur og sagnir í víkingatjaldinum. Ponyríðing við Davidsen hestum verður á parkeringsøkinum hjá SMS.

G! festivalurin, Summarfestivalurin og Fjarðafestivalurin fara at selja atgongumerki og hava útvald tónleikabrot á innandurapalli. Eitt nú spælir vælumtókti dreingjabólkurin Boys in a Band á pallinum fríggjadagin 11. mai.




*Elin Heinesen, stjóri á SamVit*




















